## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi ella av ymsum ættum,um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og regn av og á. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, týsdagin upp í hvassan vind av útnyrðingi. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 7 og 11 stig.

# 25 vetur gamal Veðrur

**Veðrølið frá Føroya Bjór, sum vit kenna tað í dag, sá dagsins ljós fyri 25 árum síðani, men sjálvur Veðrurin á etikettini er munandi eldri**

ØL

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fríggjadagin 15.07.2005 verða tað 25 ár síðan Veðrurin kom á føroyska marknaðin. Men Veðrurin er eitt gamalt navn. Hann hevur altíð staðið á etikettunum hjá Føroya Bjór - eisini tá tað var bannað at bryggja sterkt øl í Føroyum.

Tað var stovnarin av Føroya Bjór, Simon Frederik Hansen, kallaður Símun í Vági, sum sjálvur teknaði logoið.

Í sjeyti árunum var roynt at broyta rúsdrekkalógina í Føroyum, og tað kom enntá so langt sum til eina fólkaatkvøðu, men úrslitið var, at tað framvegis var bannað at bryggja sterkt øl í landinum. Men tað var ikki bannað at innflyta tað. Fyri at provokera og vísa á, hvussu tápulig skipanin var, tóku bæði Føroya Bjór og Restorff bryggjarí stig til at fáa donsk bryggjarí at bryggja danskt, sterkt øl við føroyskum etikettum. So eitt stutt tíðarskeið í sjeytiárunum bar til at keypa sterkt øl við føroyskum etikettum.

Í 1980 bleiv tað samtykt, at loyva bryggjaríunum at bryggja sterkari øl í Føroyum. Men tað talan um eitt kompromis. Fyri at fáa styrkina 5,8 %, bleiv Elefanturin bannaður í Føroyum. Tá tók onkur til, at " man forsøgte at skyde papegøjen, men ramte Elefanten."

### Frá Hoff til Veðr

Veðrurin, sum í dag fyllir 25 ár, hevur verið høvuðsmerkið hjá Føroya Bjór øll árini. Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, sigur, at onkuntíð hevur Gull ølið selt betur enn Veðrurin, men Gullið hevur ongantíð verið høvuðsmerkið hjá Føroya Bjór á sama stigi sum Veðrurin.

- Tað var gamalt at biðja um eina Hoff, men í dag siga fólk ein Veðr. Tað tók eini 15 ár at venja fólk við tað, men í dag eru tey fá, ið siga Hoff, sigur Einar Waag.

Veðraølið er mest selda ølið í dag, og er av bæði føroyingum og útlendingum viðurkent sum gott øl.




*Veðrurin frá Føroya Bjór hevur nú 25 vetrar á baki*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 22 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 27 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 26 |
| Berlin | 28 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 27 |
| Madrid | -- |
| Róm | 27 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 27 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 27 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1001 hPa. yvir Íslandi fer eystureftir. Eitt hátrýst, 1033 hPa. yvir Atlantshavinum stendur mestsum í stað.




**Í dag:**
Ein hátrýstryggur við Føroyar fer eystureftir. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/7 kl. 06[00]– 14/7. 06[00]. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,3 mm – mált frá 13/7 kl. 06[00]– 14/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 29,7 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

8. juli — Mánin longst frá jørðini
14. juli — Fyrra kvarter
21. juli — Fullmáni/mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. Juli | 01.36 | 14.08 | 00.36 | 13.08 | 00.51 | 13.23 | 03.36 | 16.08 | 04.36 | 17.08 | - | 12.23 | 11.23 | 23.58 | 01.51 | 14.23 | 02.51 | 15.23 | 01.21 | 13.53 | 02.36 | 15.08 |
| 16. Juli | 02.43 | 15.05 | 01.43 | 14.05 | 01.58 | 14.20 | 04.43 | 17.05 | 05.43 | 18.05 | 00.58 | 13.20 | - | 12.20 | 02.58 | 15.20 | 03.58 | 16.20 | 02.28 | 14.50 | 03.43 | 16.05 |
| 17. Juli | 03.27 | 15.52 | 02.27 | 14.52 | 02.42 | 15.07 | 05.27 | 17.52 | 06.27 | 18.52 | 01.42 | 14.07 | 00.42 | 13.07 | 03.42 | 16.07 | 04.42 | 17.07 | 03.12 | 15.37 | 04.27 | 16.52 |
| 18. Juli | 04.17 | 16.45 | 03.17 | 15.45 | 03.32 | 16.00 | 06.17 | 18.45 | 07.17 | 19.45 | 02.32 | 15.00 | 01.32 | 14.00 | 04.32 | 17.00 | 05.32 | 18.00 | 04.02 | 16.30 | 05.17 | 17.45 |
| 19. Juli | 05.14 | 17.42 | 04.14 | 16.42 | 04.29 | 16.57 | 07.14 | 19.42 | 08.14 | 20.42 | 03.29 | 15.57 | 02.29 | 14.57 | 05.29 | 17.57 | 06.29 | 18.57 | 04.59 | 17.27 | 06.14 | 18.42 |

5 707265 100050 >